## Nýggjur Explorari

Microsoft hevur nú sent eina nýggja útgávu av Internet Explorer á marknaðin. Í stóran mun hevur hendan fingið íblástur frá Mozilla Firefox, sum seinnu árini hevur togað stóran part av marknaðinum til sín. Eru brúkarar í dag, sum ynskja at ogna sær uppgdraderaðu útgávuna av Explorer, ber til at heinta hesa á slóðini, ieaddons.com. Nakrar av uppgraderingunum eru ókeypis, meðan hinar kosta upp í $ 400.

## Litblindur telduskíggi

Eizo, hevur sum fyrsti framleiðarin av telduskíggjum gjørt ein skíggja, sum ger hyggjaran »litblindan«. Hetta verður gjørt, so forritarar av telduskipanum, heimasíðum v.m. hava møguleika at síggja, hvussu litblind upplivan skíggjamyndina. Mett verður, at á leið 200 mió fólk eru litblind, og tí er umráðandi, at eisini hesi hava fulla nyttu av teimum møguleikum, sum kunningartøknin gevur.





*Fiskivinna verður kanska ein hornasteinur í vinnulívinum í Suðuroy framyvir og tað hevur verið nevnt, at Suðuroy skal gerast til ein feskfiskadepil. Hendan myndin er av flakavirkinum í Hvalba. Men nú er ætlanin at finna fleiri vinnuøki, sum kunnu mennast í Suðuroy og sum kunnu lyfta oynna framá*

# ...nur ...uroy



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður*

í eina slíka ætlan, segði hann.

Skal nakað spyrjast burtur úr ætlanini, má landsstýrið sjálvt fíggja hinar 40 milliónirnar.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, sigur, at hann ikki umrøtt málið í samgonguni.

Men í Innlendismálaráðnum eru tey nú í ferð við at skriva eitt upprit um málið at leggja fyri landsstýrið til viðgerðar og støðutakan.

Sjálvur metir landsstýrismaðurin, at kommunurnar í Suðuroy kunnu ikki megna tað stóra, tí tær eru so illa fyri.

Hinvegin heldur hann, at tað hevur ómetaliga stóran týdning, at ein menningarætlan fyri Suðuroy er kjølfest í Suðuroynni sjálvari og at kreftir í Suðuroy eisini binda til at vera ein part av ætlanini og eru við.

Sjálvur heldur hann, at tað er áhugavert at gera okkurt slag av grunni til vinnumenning til Suðuroy, so er hetta ein møguligur leistur.

– Eg haldi avgjørt at hetta er vert eina roynd og tí fari eg at royna at fáa undirtøku fyri at fremja ætlanina, sigur Jacob Vestergaard.

Tað, sum ætlanin er við hesum, er at biðja búskaparfrøðingin Magna Laksáfoss og samfelagsfrøðingin, Jógvan Mørkøre um at standa fyri arbeiðnum at gera eina slíka menningarætlan fyri Suðuroy.

Men at kalla hetta eina menningarætlan, er kanska ikki heilt rætt, tí tað, sum ætlanin er at gera, er ein vakstraravtala fyri Suðuroynna, har allir partar gera eina bindandi avtalu um, hvussu oyggin skal mennast.

# Neyðugt at finna semju um fíggingina beinanveg

**Ein nýggj menningarætlan fyri Suðuroynna, skal gerast sum ein vakstraravtala, har allir partar frammanundan binda seg til at fremja avtaluna í verki. Og arbeiðið hesa næstu tíðina skal vísa, um tað ber til at finna eina slíka semju**

VAKSTRARAVTALA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Skal ein menningarætlan gerast fyri Suðuroynna, slepst ikki uttanum at tosa um pengar og at finna semju um fíggingina longu frá byrjan.

Tað hava teir báðir, Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur gjørt greitt alla tíðina, síðani teir vórðu bidnir at leggja arbeiðið til rættis at gera eina menningarætlan.

Tað er nú hálvtannað ár síðani at teir báðir vórðu bidnir at gera eitt upplegg til eina menningarætlan fyri Suðuroynna.

Tá høvdu teir eisini gjørt sær nakrar fyribils tankar um, á hvørjum økjum, tað bar til at menna vinnulívið í Suðuroy.

Men tað fór at kosta eina hálva millión at seta arbeiðið ígongd og ætlanin var, at Landsstýrið og kommunurnar skuldu rinda hvør sína helvt.

Kommunurnar í Suðuroy tóku skjótt undir við ætlanini, men tað gekk meiri striltið at fáa landsstýrið at játta sín part.

Men nú er tann spurningurin avgreiddur og sostatt er skjøtil settur á arbeiðið at halda fram við ætlanini.

Sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, hevur fundur verið umborð á Smyrli ímillum partarnar.

Tað hevur eisini ligið í kortunum, at skulu nøkur verulig vinnulig átøk í Suðuroy fremjast í verki, fer tað at kosta nakað av peningi.

Tí er ætlanin, at menningarætlanin skal skipast sum ein vakstraravtala, har allir partar frammaundan binda seg til at seta ætlanina í verk og at fíggja sín part.

Hetta er eitt modell, sum er sett upp við fyrimynd í Eyðarfjørðarætlanini í Íslandi.

### Neyðugt at útvega 50 milliónir

Eitt tal upp á 50 milliónir er nevnt sum ein upphædd ið skal til, fyri at fremja eina menningarætlan fyri Suðuroy.

Og Magni Laksáfoss og Jógvan Mørkøre hava gjørt greitt, at tað tískil eisini er neyðugt at finna avtalu um hendan partin av fíggingini eisini.

Tað er ein spurningur, sum nú er til viðgerðar í Landsstýrinum.

Men kommunalar keldur í Suðuroy eru bjartskygdar, tí tað hevur alla tíðina verið greitt, at ætlanin fór at kosta kanska 50 milliónir í einum fýra ára tíðarskeiði og at avtala mátti finnast um tað frammanundan.

Tí meta tær, at tá ið landsstýrið hevur játtað tær fyrstu 250.000 krónurnar til at seta ætlanina ígongd, er tað tí, at tað eisini er sinnað at finna útvegir fyri at fíggja ætlanina.

Tá ið Løgtingið samtykti at játta 250.000 krónur at gera tað fyrireikandi arbeiðið, varð dentur lagdur á, at játtanin var liður í at fremja tankarnar, sum landsstýrið hevur lagt í Suðuroyarætlanina.

Eftir teirri nýggju tíðarætlanini, sum er løgd, skal leggast til brots beint eftir ársskiftið. Tá skulu vinnur og arbeiðsmegi í Suðuroy kortleggjast við atliti at rákinum her heima og altjóða.

Hetta er ein kortlegging, sum skal geva størri innlit í, hvørjir møguleikar eru í Suðuroy og hvussu rákið er í líknandi økjum úti í heimi.

Samstundis skulu so gerast uppskot um vinnulig tyssi í Suðuroy og tá skal eisini ráðstevna haldast um ætlanina, har greitt verður frá støðuni.

Arbeitt verður so víðari og ætlanin er, at tað skal vera klárt at taka støðu til eina vakstraravtalu á vári í 2008.



*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur*